# Føtur undir egið borð

Mikukvøldið 14. mars kl. 19.30 skipar Javni fyri áhugaverdum fundi í Klingruni í Norðurlandahúsinum.
Evnið á fundinum verður bústaðarviðurskiftini hjá fólki við menningartarni.
Javni vil fegin á henda hátt seta gongd á eitt kjak og eitt arbeiði, sum hevur til endamáls at betra um bústaðarviðurskiftini hjá fólki við menningartarni.
- Vit vilja fegin seta økið á dagskrá og spyrja tí: **Hvussu er støðan á økinum, og hvørji eru framtíðarútlitini, siga fyrireikararnir.**
Sambýlini og bústovnarnir vóru frambrot á bústaðarøkinum í síni tíð, men spurningurin er, um hesi framvegis nøkta tann tørv og tey ynski, sum tey, ið búgva á hesum bústøðum, hava.
- Í Almanna- og heilsumálaráðnum verður arbeitt við einum bústaðarpakka, ið skal lata upp fyri nýggjum møguleikum, tá tað kemur til bústaðarviðurskifti hjá fólki við menningartarni. Enn vita vit ikki so nógv um, hvussu hesin bústaðarpakkin kemur at ávirka bústaðarviðurskiftini hjá fólki við menningartarni, siga tey.
Á fundinum fara vit úr ymiskum sjónarhornum at lýsa støðuna á bústaðarøkinum.

- Hvat siga tey við menningartarni?
- Hvat siga foreldrini?
- Hvat siga politikararnir?

Fundurin er almennur og øll eru hjartaliga vælkomin.

# kjunum er hart spent




*- Hall, íløgur, sum eru fíggjaðar yvir raksturin og fígging av goymslum og skuldarum, seta stór krøv til rakstrarfígging. Tí kann roknast við, at gjaldførið hjá mongum virkjum er hart spent, siga Rasmussen & Weihe í síni niðurstøðu um fiskavirkini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

tálmaður.

Felagið vísir á, at hall, íløgur, sum eru fíggjaðar yvir raksturin og fígging av goymslum og skuldarum, seta krøv til rakstrarfígging.

- Tí kann roknast við, at gjaldførið hjá mongum virkjum er hart spent, sigur felagið í síni niðurstøðu um fiskavirkini.

## Stór hall

Í samanløgdu roknskapartølunum fyri virkini, sum nevnd eru í teiginum til vinstru, sæst, at hesi 9 virkini høvdu eitt hall í 2005 upp á stívliga 21,2 miljónir krónur, og árið fyri var hallið næstan líka so stórt – ella stívliga 20,4 miljónir krónur.

Í greiningini verða virkini tikin undir einum, og tískil sæst ikki í hesum, hvussu úrslitini hjá hvørjum einstøkum virki eru.

Men niðurstøðan hjá Rasmussen & Weihe er greið:

- Hóast nøkur av virkjunum klára afturgongd eina tíð aftrat, hevði tað helst verið skilagott at umhugsað, hvussu raksturin av fiskavirkjunum kundi verið rationaliseraður – ella uppaftur betur, hvussu størri ferð kundi komið á virðisøkingina.

## Ráfiskanøgdin

Tølini visa, at ráfiskanøgdin er vaksin fram til 2002, men minkar síðan aftur, samstundis sum talið av virkjum í greiningin minkar.

Árini 2004 til 2005 veksur ráfiskanøgdin aftur, men samanborið við 2001, tá eitt virkið aftrat var við í greiningini, eru ráfiskanøgdirnar tilsamans minkaðar við tilsamans 15,2%.

- Ráfiskakostnaðurin hevur verið svingandi síðan 2001. Árini 2001 til 2002 og 2003 til 2004 er minkingin rættiliga stór. Hinvegin øktist ráfiskakostnaðurin aftur munandi árini 2004 til 2005.

Rasmussen & Weihe siga í greiningini, at lønarposturin hevur verið veksandi árini 2001 til 2004, men minkaði aftur í 2005, tá færri fólk vóru til arbeiðis.

- Virðisøkingin hevur ikki staðið mát við lutfalsliga vøksturin í lønum, rentum, avskrivingum og øðrum í tíðarskeiðnum, sum greiningin fevnir um.



# Minni fiskur fer ígjøgnum maskinurnar

**Størstu nøgdirnar fyri hvørt ársverk vóru í 2001 og 2002. Tá virkaðu fiskafólk ávikavist 69 og 68 tons av fiski í part. Úrslitið hjá virkjunum fyri hvørt ársverk – áðrenn óvanligt – hevur eisini verið fallandi øll árini frá 2001 til 2005**

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Í eini talvu, sum Rasmussen & Weihe hava við í síni greining av fiskavirkjunum, síggja vit, at talið av ársverkum er minkað árini 2002 til 2005. Í 2005 eru nevniliga 103 ársverk færri hjá virkjunum, sum eru við í greiningini, enn tey vóru í 2002. Hinvegin øktist talið av ársverkum árini 2001 til 2002.

Vit síggja, at í 2005 høvdu umrøddu virki 1.112 ársverk, og hetta var just sama tal sum í 2004.

Taka vit ráfisk fyri hvørt ársverk, arbeiddu tey 1.112 fólkini í 2005 í miðal 64 tons av fiski móti 58 tonsum árið fyri.

Kortini síggja vit, at størstu nøgdirnar fyri hvørt ársverk vóru í 2001 og 2002. Tá virkaðu fólk ávikavist 69 tons og 68 tons av fiski í part.

Úrslitið hjá virkjunum fyri hvørt ársverk – áðrenn óvanligt – hevur verið fallandi øll fýra árini, sum kanningin fevnir um.

## Feskur fiskur

Í greiningin er eisini ein talva, sum vísir útflutningin av óvirkaðum fiski úr Føroyum árini 2001 til 2005.

Tølini visa, at útflutningurin av óvirkaðum fiski økist ógvuliga nógv árini fram til 2003, nevniliga úr 23.848 tonsum upp í 47.824 tons.

Síðan minkar útflutningurin aftur í 2004, men er framvegis rættiliga stórur, nevniliga 41.050 tons.

Í 2005 var útflutningurin av óvirkaðum fiski úr Føroyum 38.596 tons, sum er heili 61,8% meira enn í 2001.

Tað er serliga útflutningurin av hýsu og upsa, sum er nógv vaksin.